# Harðastu dómar higartil

**Føroya Rættur feldi hósdagin harðastu dómarnar higartil í rúsevnismálinum. Ein 25 ára gamal dani fekk tvey ára fongsulsrevsing, meðan ein 25 ára gamal føroyingur fekk tvey ár og tríggjar mánaðir handan rimar. Dómarnir eru treytaleysir**

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Hóskvøldið klokkan 18.30 feldi Føroya Rættur teir harðastu dómarnar í narkomálinum higartil. Tveir 25 ára gamli menn eru dømdir at sita í minsta lagi tvey ár í fongsli.

Harumframt verður hald lagt á 25.000 krónur hjá dananum og á 65.000 krónur hjá føroyinginum. Hetta er tað yvirskot, ið rætturin metir, menninir hava havt av handli við rúsevnum. Teir skulu eisini gjalda sakarmálskostnaðin.

Menninir eru dømdir eftir paragraf 191 í revsilógini. Henda lógin verður nýtt, tá talan er um álvarsom brot á lógina um euforiserandi evni.

Føroyingurin tók við dóminum og bað samstundis um at sleppa leysur, áðrenn hann skal sita dómin. Danin valdi tó at skjóta dómin inn fyri Eystara Landsrætt, tí revsingin er ov hørð.

Ákærin kravdi hinvegin, at menninir framhaldandi sita varðhaldsfongslaðir, og at teir ikki sleppa leysir, áðrenn dómurin skal sitast. Hesum tók dómarin undir við.



*Teir báðir menninir fingu í gjár harðastu revsing higartil í rúsevnismálinum. Danin fekk tvey ára fongsulsrevsing og føroyingurin fekk tvey ár og tríggjar mánaðir handan rimar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Amfetamin við Norrønu

Høvuðsmálið, ið teir báðir vóru funnir sekir í, var, at teir høvdu smuglað 200 gramm av amfetamini til Føroya við Norrønu í august í fjør. Eisini vórðu teir funnir sekir í at hava selt, keypt og givið víðari rúsevni sum hassj, kokain og ecstacy pillarar.

Kjarnin í rættarmálinum var smuglingin av amfetamininum. Teir viðgingu at hava flutt amfetaminið til Føroya. Teir vildu tó bara kennast við 187 gramm og ikki 232, sum ákæruvaldi vildi vera við. Teir fingu dóm fyri at hava smuglað 200 gramm.

Tað var danin, ið hevur fastan bústað í Føroyum, sum skipaði fyri handlinum. Hann setti seg í samband við rokkara-umhvørvið í Hanstholm, og ein avtala varð gjørd um handilin við amfetamini. Føroyingurin, ið arbeiddi umborð á Norrønu, fór til Danmarkar eftir rúsevnunum. Hann fekk eisini 30 ecstacy pillarar við sær til Føroyar.

Amfetaminið skuldi nýtast at rinda aftur skuld, ið føroyingurin hevði til ymsar persónar. Restin varð goymd aftanfyri hvíldarheimið Naina í Gundadali í Havn.

Báðir høvdu umleið tjúgu ákærur hvør, og teir vórðu funnir sekir í teimum flestu. Tó var onkur einstøk ákæra, ið dómarin ikki fann haldgóð prógv fyri.

### Skipaður handil

Danin varð tikin 11. januar í ár. Hann hevði tá 165 gramm av amfetamini í bilinum og nakrar ecstacy pillarar. Síðani hevur hann sitið varðhaldsfongslaður.

Føroyingurin varð í fyrstu atløgu tikin 16. januar. Hann varð síðani leyslatin dagin eftir, men handtikin aftur 25. januar, tá fleiri upplýsingar um hann komu undan kavi.

Danin varð eisini funnin sekur í at hava givið løgregluni rangar upplýsingar undir avhoyringunum. Hesar upplýsingar høvdu við sær, at løgreglan hevði ein mann í avbyrging uttan haldgóða orsøk. Dómarin gav manninum tríggjar mánaða fongsulsrevsing fyri ta rongu frágreiðingina.

Ákæruvaldið kravdi sera harða revsing fyri hesi lógarbrotini. Orsøkin er, at talan er um sera hørð rúsevni í hesum málinum. Ákæruvaldið førdi fram, at amfetamin, ecstacy og kokain eru sera vandamikil rúsevni, og tað eigur at hava herðandi ávirkan á dómin. Harumframt varð víst á, at føroyingurin tvær ferðir fyrr er dømdur eftir lógini um euforiserandi evni.

Hann viðgekk í rættinum, at hann hevur verið misnýtari av rúsevnum í fleiri ár, og at hann ofta stóð í skuld til veitarar av rúsevnum. Danin er hinvegin ongantíð fyrr dømdur.

Ákærin vísti á, at virksemið teirra hevur verið sera umfatandi, og tað er farið fram undir skipaðum viðurskiftum. Eisini varð víst á, at nøgdirnar, sum talan her er um, eru rættiliga stórar.

Enn eru fleiri rættarmál í narkomálinum, sum ikki eru avgjørd. Væntandi verða hesi sett á skránna komandi fýra vikurnar.

## Framsýning hjá Havnar Fimleikafelag

Nú fimleikaárið er komið at enda, standa árligu fimleikaframsýningarnar fyri framman. Hesar verða í Ítróttarhøllini á Nabb leygardagin 16. mars kl. 16.00 og mánadagin 18. mars kl. 19.00.

Tær árligu fimleikaframsýningarnar eru dagar, sum flestu fimleikarar síggja fram til alt árið. Dagarnir eru spennandi og eingi ivi skal verða um at hetta eru dagar sum eru dagar fimleikanna.

Fimleikararnir eru spentir at vísa fram tað tey hava vant í vetur.

Liðini eru nógv í tali, at felagið hevur nógvu árini valgt at hava 2 framsýningar, eina fyri teimum yngru liðunum og eina fyri tey eldru.

Til tað yngru framsýningina luttaka lið frá Børn og foreldur til 5. flokk, meðan til tað seinnu framsýningin luttaka lið frá 4. - 5. flokk amboð til tey vaksnu liðini.

Amboðs- og rútmufimleikur eru við til báðar framsýningarnar.

Hvørt árið endar fimleikaframsýningarnar við handan av nálum og ídnisprógvum, og í ár er einki undantak hesum viðvíkjandi. Talan er um 5- 10- og 15 árs nálir. Tað er altíð ein serligur dámur yvir eina tílíka handan. Og at fáa eina tílíka viðurkenning fyri fleiri árs fimleikaarbeiðið, er sanniliga eisini nakað at verða stoltur av.

Dámurin er ikki minni, tá ið talan er um ídnisprógv.

Ídnisprógv verður bert givið til ein fimleikara á hvørjum liðið.

Ídnisprógv verður bert latið til fimleikarar sum eru í skúlaaldri og tað sum sermerkir ídnisprógvið er, at fimleikarin sum fær prógvið skal hava møtt væl upp, hava verið sera íðin og ágrýtin.

Fimleikaárið hjá Havnar Fimleikafelag hevur hildnast væl, bæði tá talan er um innanhýsis tiltøk og innanhýsis kappingar.

Eisini tá talan er um Stórkappingina sum FFS skipaði fyri í feb. og mars í ár. Her vann HF 3 av 4 kappingum.

Viðmerkjast skal at smágentur A, sum vunnu sín bólk, fara við, til DM í Danmark sum gestalið.

Okara gentur verða dømdar á sama hátt sum hini liðini, tó luttaka tær ikki í sjálvum DM.

Kappingin verður leygardagin 6. apríl.

Hóast vanliga fimleikaárið er liðugt, so eru vit ikki heilt liðug enn.

FM kappingarnar fyri amboðsliðini, sum FFS skipa fyri, verða í apríl og mai mánaða. Spennandi verður at síggja, hvussu fer at gangast felagnum í hesum kappingum.

Eisini verður summarfimleikur aftur á skránni mánadag og mikudag kl. 18.00. Byrja verður mikudagin 3. apríl.

At enda ynskja vit í Havnar Fimleikafelag at takka fyri í vetur og ynskja øllum eina góða framsýning og eitt gott summar.

# Fingu longda fongsling

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur gjørdi hósdagin av at leingja varðhaldsfongslingina hjá tveimum monnum, ið eru skuldsettir í rúsevnismálinum.

Ein 27 ára gamal maður hevur fingið varðhaldsfongslingina longda í tvær vikur tó ikki í avbyrging. Hann er skuldsettur eftir lógini um euforiserandi evni, og tá kann hann bara sita avbyrgdur í átta vikur.

Ein 33 ára gamal dani hevur fingið varðhaldsfongslingina longda í fýra vikur. Tvær tær fyrstu vikurnar eru í avbyrging. Hesin er skuldsettur eftir revsilógini, tí hansara lógarbrot eru álvarsamari.

Ein annar dani, sum býr í Keypmannahavn, fekk mikudagin sína varðhaldsfongsling longda við tveimum vikum í avbyrging.

### Rættarmál í gjár

Í gjár vóru tveir menn, sum eru 23 og 27 ára gamlir, í Føroya Rætti. Teir vóru ákærdir fyri brot á lógina um euforiserandi evni. Hesir menninir eru tiknir seinni, eftir at løgreglan hevur fingið upplýsingar ígjøgnum avhoyringar og kanningar í narkomálinum.

Yngri maðurin er ákærdur fyri at hava selt eitt kilo av hassji og fyri at hava 45 gramm av hassji á sær, tá hann varð handtikin.

Tann eldri er ákærdur fyri at hava selt og keypt umleið tvey kilo av hassji tilsamans ígjøgnum fleiri ár.



# Saltfiskamarknaðurin lækkandi

**Tað er ikki so lætt at selja saltfisk í løtuni, sum tað onkuntíð hevur verið. Goymslurnar eru í størra lagi, og prísurin er lækkandi. Men einki hóttafall er kortini, siga føroyskir framleiðarar**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Saltfiskamarknaðurin í Suðureuropa er lækkandi í løtuni, og tað fer ivaleyst eisin at merkjast á avreiðingarprísunum í Føroyum, vænta føroyskir virkisleiðarar*

*Savnsmynd*

Eiði: Saltfiskagoymslurnar í Føroyum eru vaksandi, tí meira verður arbeitt av saltfiski, enn flutt verður út. Eingin virkisleiðari, Sosialurin hevur tosað við, sigur seg tó stúra fyri gongdini.

Saltfiskamarknaðurin í Suðureuropa er minkandi. Lutvíst tí fólk leggja matvanar um. Men eisini kann ein grund vera, at meginparturin av ES skifti valuta fyrr í ár, og fólk ikki enn hava vant seg við nýggja peningin.

Møguliga kenna fólk seg ikki heilt trygg við hendan nýggja valutan og duga ikki reiðiliga at rokna prísirnar um. Tí gerast tey kanska eitt sindur varin við, hvat tey keypa, verður ført fram.

Virkisleiðarar, Sosialurin hevur tosað við, halda, at framleiðslan í Føroyum er heldur meira í ár enn undanfarin ár. Men ikki so stór kortini, at tað skal gera nakran mun.

Hinvegin gongur tað seinni undan við útflutninginum, enn tað fyrr hevur gjørt. Tað kemst av, at goymslurnar í Europa eru í meira lagi, og soleiðis verða tær føroysku eisini størri, enn gott er, siga teir.

Páll Gregersen, stjóri á fiskavirkinum í Gøtu, sigur, at har arbeiða tey somu nøgdir, sum tey plaga, men tað fer nakað minni av landinum hvørja viku. Tað ger sjálvandi størri goymslur, sum so aftur helst fer at ávirka prísin nakað. Hann metir, at saltfiskaprísurin er lækkaður eini 10 prosent.

– Vit eru eitt sindur varnir og hava ikki arbeitt tað heilt stóra av saltfiski, sigur Petur Mohr, virkisleiðari á Norðís á Eiði.

Hann sigur, at har hava tey tamarhald á støðuni og fylgja gjølla við, hvussu útlitini eru.

Hann væntar nakað minni av saltfiski á virkinum eftir páskir, tí sum er, eru útlit fyri, at tað ikki verður bati í marknaðinum beinanveg.

Petur Mohr heldur eina orsøk til fallandi marknaðin millum annað vera, at fólk eru við at skifta matvanar suðuri í Europa.

– Saltfiskaprísurin hevur verið sera høgur, og fólk eru ivaleyst farin at eta annað enn fisk. Eitt nú høsnarungar ella annað, sum fæst væl bíligari enn fiskur.

Um so er, skal ikki roknast við at tey leggja um aftur beinanveg, hóast saltfiskaprísurin lækkar eini 10 prosent ella so. Tað skal nógv størri lækking til, fyrr enn fók aftur fara at velja fiskin fram um tað, tey nú eru farin at brúka, heldur hann.

Hann vísir á, at í fjør varð toskur III keyptur fyri 25,- krónur kg., meðan prísurin í hesi vikuni var einar átta krónur.

Tað ger ikki nakra stóra sølu beinanveg, sigur hann, tí væntast kann, at teir, sum hava stórar goymslur við dýrum fiski í eitt nú Spania, vilja selja tær fyrst, áðrenn teir keypa nýtt.

Petur Mohr væntar ikki, at føroyingar fara at arbeiða saltfisk til at hava liggjandi á goymslu, hóast fiskurin kanska fæst bíliga her í Føroyum.

– Føroysku fyritøkunar eru smáar og hava ikki ráð at binda fisk á goymslu, sigur Petur Mohr, virkisleiðari á Norðís á Eiði, sum væntar, at fiskaprísurin sum heild kann fara at lækka nakað í framtíðini.


